*P/F Vinnan í Gøtu er ein fyritøka í støðugari menning. Fyritøkan eigur og rekur 4 uppisjóvar fiskifør og hevur umleið 70 fólk í starvi. Í umsitingini starvast fast 4 fólk - stjórin, umsitingarligi leiðarin, tekniskur leiðari og eitt skrivstovufólk. Okkara umsitingarleiðari gjøgnum fleiri ár, hevur valt at taka við nýggjum avbjóðingum, og verður tí í hesum sambandi søkt eftir*

# Umsitingarleiðara

Starvið er sera fjølbroytt, og arbeiðsuppgávurnar, sum viðkomandi kemur at røkja, eru í høvuðsheitum hesar:

**Uppgávur:**
- At vera við til saman við leiðslu felagsins og øðrum starvsfólki at tryggja eina framhaldandi vælvirkandi skrivstovu.
- Ábyrgd fyri einum parti av innkeypinum hjá felagnum.
- At stýra ymiskum fíggjarviðurskiftum og gera útrokningar/framrokningar av ymsum slag og annars virka sum fíggjarligur ráðgevi hjá leiðslu og nevnd í sambandi við framtíðar ætlanir.
- At leggja til rættis tilfar til fundir og virka sum skrivari á fundum felagsins.
- Luttaka á fundum við myndugleikar, fíggingarstovnar og onnur uttanfyri felagið.
- At samskifta við tey móttøkustøð, sum selt verður til.
- At leggja til rættis dagligu uppgávurnar á skrivstovuni.
- At hava samskifti við peningastovnar um hendi.
- Aðrar fyrifallandi uppgávur, so sum samskifti við skipini og uppgávur sum óvæntað stinga seg upp.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta, at tú hevur royndir við skrivstovuarbeiði og hevur gott skil fyri fíggjarligum viðurskiftum. Samstundis er tað eitt krav, at tú dugir at nýta tey mest vanligu telduforritini og annars hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti. Málsliga skalt tú duga væl at orða teg á føroyskum og enskum bæði í skrift og talu.

Sum persónur vænta vit, at tú ert ágrýtin og miðvísur, tær dámar væl stórar avbjóðingar og hevur lætt við at samstarva. Harafturat vænta vit, at tú ert fleksibul og kanst arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, tá tað krevst. Av tí at størsti parturin av dagliga samskiftinum er um skip og fiskivinnu, kunna umsøkjarar við kunnleika til hesa vinnu hava ávísan fyrimun.

Ynskiligt er, at viðkomandi starvsfólk kann byrja í starvinum um hálvan juni 2006. Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu við arbeiðsgevara.

Umsóknir verða at senda skjótast gjørligt, og í seinasta lagi hósdagin 25. mai 2006 til: Virkisráðgeving Spf, Boks 26, 600 Saltangará. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Virkisráðgeving,

Virkisráðgeving Spf
Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðsku- & Umhvørvisskipanir
Heimasíða: http://www.vrg.fo






# Maskinmeistarar søkjast til Elfelagið SEV

Eitt fast starv sum maskinmeistari á Fossáverkinum í Vestmanna er leyst at søkja til setan frá umleið juni 2006. Eisini verður søkt eftir einum feriuavloysara fyri maskinmeistarar á Fossáverkinum til summarferiuavloysing í ár.

**Starvið:**
Maskinmeistaraarbeiðið umfatar rakstur og hald av Fossáverkinum, bæði sum dagarbeiði og sum vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Undir Fossáverkinum hoyra eisini Mýru-, Heyga- og Eiðisverkið, sum eins og vatnturbinan á Strond verða stýrd frá Fossáverkinum. Talan er um tilsamans 7 vatnturbinuaggregat við einum samlaðum mátti upp á 28,4 MW. Harafturat stýrir vakthavandi á Fossáverkinum býtið av framleiðsluni millum elverkini í meginøkinum, herundir eisini Sundsverkið og Strond (lastfordeiling). Eisini er vakthavandi á Fossá-verkinum koblingsleiðari fyri háspenningsanleggini í meginøkinum.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at umsøkjararnir hava fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært 6. lønarflokk eftir sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.
Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan.
Byrjunar- og endalønin í 6. lønarflokki er í løtuni netto ávikavist kr. 24.581,51 og kr. 26.288,56 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi tilsamans ávikavist kr. 3.072,69 og kr. 3.286,07 um mánaðin.

*Umframt nevndu løn kann roknast við vaktargjøldum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn.*

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum verða send Elfelagnum SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi fríggjadagin, tann 2. juni 2006.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Pól Joensen, verksmeistara á Fossáverkinum ella til Berg Didriksen, deildarstjóra á Maskindeildini, báðir á telefon nr. 346800.

Elfelagið SEV



# Frá Landsfelag sløkkiliðsmanna

Aðalfundur felagsins verður hildin umborð á Smyrli kl. 13.00 tann 10. juni 2006 við fylgjandi skrá.

- Val av orðstýrara.
- Frásøgn formansins frá farna ári.
- Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
- Val av nevndarlimum.
- Val av tiltakslimum.
- Val av økisumboðum.
- Val av grannskoðara.
- Møgulig uppskot frá limunum.
- Ymiskt.

Mál, ið ynskjast viðgjørd á aðalfundi, skulu vera formanninum í hendi seinast 14 dagar áðrenn aðalfundin. Eru tað mál, ið ynskist atkvøtt um, skal skrivligt uppskot fylgja við.

**Landsfelag sløkkiliðsmanna**
Postsmoga 216 · 600 Saltangará
Formaður/ Sørin S. Djurhuus



**Søkt verður eftir mekanikara/maskinsmiði til verkstað okkara.**

Arbeiði fevnir um, at hava dagligu leiðsluna av verkstaðnum har afturat kundarøkt, umvælingar, servisu v.m.

Umsøkjarin má verða mekanikari ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

sp/f Ó.K. HEILSØLA & MASKINUR

**Handilin á kajuni í Hvalvík • Tel. 422 394 • www.okheilsola.com**



# Hondbóltssamband Føroya

Eykaaðalfundur verður 10. juni 2006 kl. 10.00 í ÍSF-húsinum.

**HSF**



FAROE SEAFOOD

# Maskinmaður

Søkt verður eftir einum maskinmanni, at byrja sum skjótast.

Arbeiðstíðin er í samband við framleiðslu, arbeitt verður í tveimum vaktum.

Arbeiði umfatar viðlíkahald av maskinum o.a. fyrifallandi maskinarbeiði,

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Remi á telefon 594220

Umsóknarfreistin er 1. juni.

**P/F Faroe Seafood, Vestmanna**
Postboks 118
FO-350 Vestmanna
Tlf. 355555 - Telefax 424755